## DAGSINS MEINING

# Ein søgulig hending

So eydnaðist tað ES londunum at semjast um eina grundlóg fyri alt ES samveldið. Uttan mun til um okkum líkar hetta, so er grundlógin ein søgulig hending, tað skerst ikki burtur. Hóast allir statsleiðarar nokta fyri tí, so er semjan um ES grundlógina tað higartil størsta stigið fram móti Sameindu Statum Europas. ES grundlógin, sum skal verða komin endaliga í gildi í 2014, flytir myndugleikan á avgerandi økjum frá teimum einstøku tjóðunum og til samveldið við ráðharraráði, nevnd og tingi.

Tey mest týðandi myndugleikaøkini, ið verða flutt frá limalondunum til samveldismyndugleikarnar, eru uttanríkismál, verjumál og rættar- og løgreglumál. Her er sostatt talan um ómetaliga stórar broytingar, ið flyta stór og týðandi myndugleikaøki frá limalondum til samveldið. Her er sostatt talan um eina sera víttfevnandi miðsavnan av politiskum valdi. Tað er í hesum høpi áhugavert at minna á, at alt hetta, sum nú er hent, eru broytingar, sum eitt nú danskir og bretskir politikkarar søgdu ongantíð fór at henda. Danski forsætisráðharrin Schlüter gjørdist kendur fyri orðini: Unionen er død! Her skuldi bert vera talan um búskaparligt samstarv og als einki politítisk samstarv. Samveldið er sostatt ikki deytt men sprellivandi.

Tað er ein góður spurningur, hví øll gongdin hevur verið tann øvugta av tí sum sagt og lovað varð í 1972, tá Danmark og Bretland fóru upp í tað táverandi EF nú ES. Hetta hevur nakað at gera við, at alt Europa og øll verðin eru broytt á ein hátt, sum eingin tá dugdi at hugsa sær. Múrurin fall, politisku og samfelagsligu broytingarnar í Eystureuropa, internationaliseringin og yvirgangurin eru nøkur av lykalorðunum, tá vit skulu finna svarið til hendan spurning. Tað er eisini ein sera áhugaverdur spurningur, hvat, ið tey lond, sum enn eru uttanfyri ES nú far at gera. Mestan áhugan og størsta týdningin fyri Føroyar í hesum samanhangi er spurningurin, hvat Noreg og Ísland nú fara at gera. Tað er eingin, sum í ramasta álvara longur trýr, at hesi bæði lond kunnu halda seg uttanfyri í tað óendaliga. Til tess er teirra búskapur alt ov samantvinnaður við ES. Hartil kemur, at tann tíð nærkast, tá tað fer at gerast ein politiskur trupulleiki hjá báðum hesum londum at standa uttanfyri ES. Tá hetta hendir, so fer aftur tað óhugsandi at henda, at bæði Noreg og Ísland fara at søkja um limaskap í ES. Hvussu fer hetta at ávirka okkum og hvat gera Føroyar tá? Tað er ein spurningur, sum øll eiga at seta sær longu nú.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Er Norðuratlantsbólkurin ein pengamaskina?

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Hóast tað er hægsti móti í føroyskum politikki at tosa um stuðulsfría vinnu og sjálvberandi búskap, so hendir tað seg meira enn so, at tey, sum vilja gera seg til talsmann fyri hesi sjónarmið, sjálvi standa í fremstu røð, tá talan er um at móttaka almennan stuðul. Eitt dømi um hetta er Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi.

Eftir fólkatingsvalið í november 2001, skipaði fólkatingsumboðið hjá Tjóðveldisflokkinum, saman við grønlendsku fólkatingsmonnunum ein tingbólk, sum verður kallaður Norðuratlantsbólkurin. Hesin bólkur hevur sambært skipanini fyri tingbólkar á fólkatingi rætt til at fáa eina grundupphædd á kr. 59.502 um mánaðin fyri hvønn tinglim, umframt eina so-kallaða »mandatupphædd« sum er kr. 37.263 um mánaðin pr. tinglim. Hesar inntøkur koma afturat sjálvari lønini hjá fólkatingsmonnunum.

Alt í alt merkir hetta, at Norðuratlantsbólkurin fær góðar 290.000 krónur um mánaðin ella slakar 3,5 mió. krónur um árið frá Fólkatinginum til at gjalda lønir til skrivstovufólk, halda ráðstevnur fyri o.s.fr., umframt sjálva lønina hjá tingmonnunum. Hevði tað eydnast Norðuratlantsbólkinum at fingið fólkatingslimin hjá Sambandsflokkinum uppí bólkin (sum teir royndu dúgliga eftir valið), so hevði Norðuratlantsbólkurin fingið eina samlaða upphædd á kr. 387.060 um mánaðan, ella 4,64 mió. krónur um árið umframt lønina hjá tinglimunum.

Hin 21. januar 2002 skrivaði Dimmalætting, at limirnir í Norðuratlantsbólkinum vóru farnir at ótolnast, tí hóast tveir mánaðir vóru gingnir síðani fólkatingsvalið, so vóru skrivstovuviðurskiftini framvegis ikki komin uppá pláss, og tí var tolið farið at ganga undan. Formansskapurin í Fólkatinginum hevði í hesum sambandi fingið eitt bræv frá Norðuratlantsbólkinum, har biðið varð um, at hølistrupulleikin varð loystur sum skjótast, tí, sum blaðið skrivar:

»Norðuratlantsbólkurin hevur í fyrsta umfari fingið bjóðaðar fimm skrivstovur, ið liggja saman á Christiansborg, men hetta er ov lítið til tey sjey-átta fólkini, ið eftir ætlan skulu arbeiða hjá bólkinum. Vit hava í tveir mánaðir víst eskimoiskt tolsemi, men nú er nóg mikið. Fyribils skrivstovurnar eru ov fáar og smáar,« segði Norðuratlantsbólkurin.

Norðuratlantsbólkurin, sum arbeiðir fyri føroyskum og grønlendskum fullveldi, vil sostatt ikki ganga á odda, tá talan er um at frásiga sær stuðul og rættindini, sum teir eiga í ríkisfelagsskapinum, og einki er sum bendir á, at bólkurin í hesum førinum hugsar so nógv um tær 40 vaskikonurnar á Vesterbro, hvørs skattakrónur, allar sum ein, fara til at fíggja skrivaralønir og ráðstevnur hjá Norðuratlantsbólkinum á Christiansborg.

# Orðaskifti um fiskifrøði

Nú siðvandu fiskifrøðingarnir og teir meira frílyntu fiskifrøðingarnir aftur eru farnir at stríðast um fiskifrøðiligar spurningar, hevur Útvarp Føroya sett teir báðar fiskifrøðingarnar, Petur Steingrund og Jón Kristjánsson, saman í Útvarpsstovuni.

Orðaskiftið er um teir grundleggjandi spurningar um hvussu fiskastovnarnir best kunnu verjast. ICES og Petur Steingrund halda uppá, at vit best verja fiskastovnarnar, um vit ikki fiska alt ov nógv burturúr stovninum á hvørjum ári.

Jón Kristjánsson heldur harafturímóti, at vit skulu fiska so nógv, sum til ber. Jón heldur uppá, at toskastovnurin er so illa fyri beint nú, júst tí vit hava fiskað ov lítið seinastu árini.

Í orðaskiftinum koma báðir inn á toskastovnarnar í Kanada og í Grønlandi, sum hvurvu. Spurningurin er, um tað var ovurfisking ella hitaviðurskifti, sum gjørdu seg galdandi.

Jón Kristjánsson heldur ikki, at tað ber til at fiska ein fiskastovn upp. Her er Petur Steingrund heilt ósamdur og vísir millum annað á norðhavssildina.

Jón Kristjánsson hevur staðið á lønarlistanum hjá Fiskimálaráðnum í trý ár. Samstundis leiga vinnufeløgini Jón Kristjánsson at ráðgeva teimum í tilmælinum til Bjørn Kalsø, landsstýrismann.

Men íslendsku vinnufeløgini og íslendska stjórnin brúka ikki Jón Kristjánsson. Orsøkin er, sigur Jón, at hansara ráðgeving hevði tikið beinini undan kvotuskipanini. Meira hevði verið fiskað, men peningakervið er so fast knýtt at kvotuskipanini, sigur Jón, at órógv hevði komið í íslendska virðisbrævamarknaðin.

Petur Steingrund sigur í orðaskiftinum, at Jón Kristjánsson er skaðiligur. Jón svarar aftur og sigur, at ICES er at líkna við eina mafiu.

Orðaskiftið millum Petur Steingrund og Jón Kristjánsson kemur í Útvarp Føroya í dag klokkan 17.05.

Vertur er Helgi Jacobsen.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

Stjórnarrit 4:

# Hugsjónin um beinleiðis fólkaræði

**Formansskapurin í grundlógarnevndini**

At stýra landinum ræður um virði. Vit velja alt eftir virðum okkara at stýra hesa ella hasa leið. Grundarlagið undir fólkaræðinum er tí, at ongin kann vita betur, um mál og virði eru góð ella ring. Ongin er serfrøðingur í virðum. Serfrøðin kann einans siga frá hættum ella miðlum at røkka longu settum málum.

Tá ræður um at stýra landinum, er tað tí fólkið, sum óskert eigur at velja millum mál og virði. Einans tá tað ikki ber til hjá fólkinum at savnast og taka støðu til mál, og so tá ræður um at fremja samtyktir í verki, eiga umboð fólksins og onnur embæti at taka støðu. Umboðsstýri eigur einans at verða tikið fram um beinleiðis fólkastýri av praktiskum og ikki hugsjónarligum orsøkum.

Vit mugu ásanna, at hóast føroyska samfelagið er lítið, so er tað á mangan hátt eins fjøltáttað sum onnur nógv størri samfeløg við mongum ymiskum áhugamálum í kapping. Hetta hevur við sær, at hóast tinglimir liggja um teir tríati í tali, so avmyndar tingið ikki altíð øll virðini og áhugamálini hjá veljaraskarðanum. Tingfólk skulu umboða so nógv ymisk virði: vinstra-høgra, ríkisfelag-fullveldi, bygd-bý, yngri-eldri, sjóvinnu-landvinnu, norðanfjørðs-sunnanfjørðs, siðbundi-nýmótans og so frameftir. Tí er trupult hjá teimum altíð at vera líka umboðandi; tey kunnu hava boðað frá støðu síni til sumt av hesum, men neyvan alt. Á sama hátt hevur veljarin tikið støðu út frá summum, men ikki øllum av hesum virðistvístøðum.

Føroyar eru eisini lítið land, har stutt er millum fólk og politikarar og skjótt at fáa orð á fólk, og eigur beinleiðis fólkaræði sostatt at hava enn betri fortreytir her á landi enn so manga aðra staðni. Tí verður idealið um beinleiðis fólkaræði upphevjað til eitt ráðandi virði í føroysku stjórnarskipanini, sum skotið upp í fyrra flaggdagsáliti.

Fyrri liður í grein 18 (2) í uppskotinum ljóðar soleiðis: »Íbúgvar landsins eiga rætt at taka støðu til lógir og viðtøkur við fólkaatkvøðu.«

Henda áseting staðfestur rættin hjá borgarunum til við fólkaatkvøðu at taka støðu til samtyktir og lógir. Ásetingin fer ivaleyst at merkja, at tingið fer at kenna skyldu til at leggja mál til fólkaatkvøðu. Hetta kann vera, tá fólkið hevur serligan áhuga fyri málinum, ella tá tingfólk kenna seg lítið umboðandi, sum í málum har ósamsvar kann vera millum veljara og tingumboð.

Onnur áseting, sum eisini staðfestir hugsjónina um beinleiðis fólkaræði, er grein 18 (3), ið ljóðar so: »Eru tingmenn ónøgdir við samtykta tinglóg, kann triðingur av tingmonnum krevja lógina lagda fyri fólkið í síðsta lagi viku eftir, at hon er samtykt.« Henda áseting gevur sostatt triðingi av tingmonnum rætt til at krevja samtykta tinglóg lagda til fólkaatkvøðu innan viku eftir samtyktardagin. Sum greitt nærri frá í seinni riti, er henda áseting týdningarmikið amboð til at verja minnilutan og tí eisini til at elva til samstarv um miðuna á tingi. Kortini er ásetingin samstundis partur av hugsjónini um beinleiðis fólkaræði, og við slíkari áseting verður tað lætt hjá einum minniluta á tingi at krevja mál løgd beinleiðis til fólkið, og kemur meirilutin tí í størri mun enn nú at standa fólkinum beinleiðis til svars.

Væntandi fara summi, ið óttast fólksins óskerdu rødd, at mótmæla slíkari áseting. Men neyvan er vandi fyri, at minniluti av tingmonnum fer at misnýta slíkt amboð og krevja fólkaatkvøðu í tíð og ótíð; tann politiski flokkur, ið roynir at gera sær dælt av slíkum amboði vil skjótt missa virðing og trúvirði millum manna, og tí er væntandi, at javnvág kemur í av sær sjálvum.

# Hvør lýgur um hvønn?

**Virgar T. Dalsgaard**



Tann 10. juni hevði Sosialurin á forsíðuni hesa ógvisligu yvirskrivt: »Berlingarin lýgur um Oskarsson«! Eg hvakk við og helt sjálvandi, at her varð gjørt forvitnisligt og álvarsamt journalistiskt kanningararbeiði av Sosialmonnum niðri í Danmark, so heiðurskrýnda danska málgagnið Berlingska tíðindi kundi avdúkast sum grunt lættisoppablað!

Men tá ið eg blaði inn á sjálva greinina, vísir tað seg, at »keldan» til reinsingina av harra Oskarssyni er Oskarssonurin sjálvur! Hetta má vera journalistikkur heilt eftir serføroyskum leisti. Sosialurin hevur ikki so frægt sum gjørt sær tann ómak at venda sær til Berlingaran sjálvan og fyrileggja teimum skuldsetingarnar frá Oskarssyni. Teir fara bara við inhabila búskaparfrøðinginum sum vitni á forsíðuna og leggja Berlingaran undir ærumeiðing! Hetta er einastandandi ábyrgdarleysur journalistikkur!

**Er einki, sum eitur keldukritikkur á Sosialinum?**

Fyri tveimum døgum síðani, t.e. týsdagin 15. juni fekk eg samband við harra B. Højgaard Sørensen, journalist á Berlingska tíðindi. Hesin maður váttaði fyri mær, at hann stóð við hvørt orðið, sum skrivað varð um Oskarssonin - og sum Sørensen sjálvur málbar seg: »Vi har det hele på bånd!« Hann bakkar ikki fyri Oskarssoninum, og hann avsannar einki. Nú stendur orð móti orði. Antin lýgur Berlingarin ella lýgur Oskarssonurin.

Men er tað soleiðis, at Oskarssonurin fastheldur, at Berlingarin lýgur, so eigur hann at leggja sak móti Berlingaranum beinanvegin.

**Spillnakin Oskarssonur**

Annars má eg leggja afturat, at skullu vit velja millum at trúgva Berlingaranum ella Oskarssoninum, er valið ikki trupult, tí Oskarssonurin stendur frammanundan púra úrlatin. Hann hevur fyrr víst seg eiðasøran í almennari dømikraft og roynir nú sum ein annar advocatus diaboli at verja seg við, at hann ikki á Christiansborg hevur sagt nakað móti blokki ella sjómonnum, men tað er púra óinteressant og líka mikið, tí hann hevur bæði í Danmarks Radio, beint áðrenn fundin og í Berlingaranum sagt akkurát tað, sum hann nú feikliga roynir at skulka sær undan!

Tað er allarhelst so, at harra Oskarssonur bara er ein pinkulítil finna á talvborðinum hjá Hoydalsfeðgunum, og tessvegna hava nógv fólk higartil hildið Hermannin Oskarsson verið ein mun frægari og knapt so maktsjúkan sum harra Høgna Hoydal, men nú tá ið til skarpskeringar kemur, og hendur skullu vaskast aftaná djúpt láturligu Christiansborgseancuna, vísir tað seg, at Oskarssonur er akkurát sama ómansliga lyguvætti sum Høgni Hoydal,

Sjaldsama løgið er, at Oskarssonur ikki forstendur, at tað er púra ótolandi, at eitt land, sum næstan svimur í búskaparfrøðingum, letur sama mannin hava tvær so kontroversiellar kaskettir, nevniliga bæði stjórastarv fyri hagmonnum og formansstarv í búskaparráðnum.

Eg nevndi tað fyri einum donskum økonomi, at leiðarin fyri okkara pendant til Statistisk departement og Det økonomiske råd var ein og sami maður – hann rysti við høvdinum og vildi illa trúgva tí. Einasta viðmerking hansara var, at ein slíkur maður hevði sett seg á ein ræðuligan uriaspost og mátti gerast heilt schizofrenur í høvdinum!

Var Oskarssonurin nakar maður, erkendi hann sjálvur hetta og segði annað starvið frá sær! Men so frægt av fínfølilsi skullu vit ikki rokna við frá hesum maktsjúka manni, einum embætismanni, sum ætlaði at stilla upp á tjóðveldislistanum til seinasta løgtingsval. Inhabilitetur hevur í Føroyum leingi verið dyrkaður sum eitt princípp, og tað tykist at versna!

# Eimskip økir tænastuna innan fiskivinnuøki

**Eimskip hevur stovnað nýtt felag innan altjóða framflutning av farmi**

FARMAFLUTNINGUR
*Tíðindaskriv*

Í hesum døgum stovnar Eimskipafelag Íslands ehf. fyritøkuna Eimskip Reefer Logistics BV. Felagið er stovnað við tí fyri eyga at økja tænastuna í framflutningi av frystum og køldum fiskavørur kring allan heimin. Málið við nýggju fyritøkuni er at styrkja heildartænastu Eimskips innan fiskivinnuøki.

Nýggja felagið fer at samskipa tænasturnar frá ymsu Eimskip skrivstovunum, bæði í Føroyum, Íslandi og uttanlands. Hetta ger, at tað ber til hjá Eimskipum at bjóða samskipaðar og enn meira víttfevnandi tænastur innan sjóflutning og goymslu av fiskavørum runt um í heiminum. Nýggja felagið fer eisini at virka sum bindilið millum verandi tænastur hjá Eimskipum og tænastunum hjánorska felagnum CTG, sum Eimskip keypti meirilutan av fyri tíð síðan. Eisini verður fyritøkan bindilið við onnur skipafeløg og tænastuveitarar. Dentur verður lagdur á at bjóða heildarloysnir, har platta- og bingjuflutningur verður samansjóðaður eftir tørvi.

Høvuðsskrivstovan hjá Eimskip Reefer Logistics BV verður í Hollandi; bæði í Rotterdam og í Schiphol Airport, har partur av flogfraktartænastu Eimskips er. Har er eisini ein onnur fyritøka hjá Eimskipum, nevniliga fyritøkan Freshport, sum hevur at gera við handling og tænastu av feskvørum loftvegis. Stjórin í nýggja felagnum er Bas Giezen. Hann hevur royndir, sum sølu og marknað arleiðari í einari av størstu fyritøkum í Europa innan flutning og goymslu av fiskavørum.

Heimshandilin innan fiskavørur er broyttur munandi seinnu árini. Størri og størri partur av framleiðsluni av fiskavørum fer fram í Kina. Keyp og søla av ráðvøru og fiskavørum annars fer fram allastaðni í heiminum. Hetta ger, at eftirspurningurin eftir øðrvísi flutningstænastum økist saman við øktum krøvum til úrslit og til trygd.

Við felagnum Eimskip Reefer Logistics BV økir Eimskip munandi um sína altjóða tænastu. Málið er at ganga øktu krøvum kundans á møti.

Flutningur Eimskips av frystum og køldum fiskavørum er vaksin munandi seinastu árini. Árliga stendir Eimskip fyri flutningi av 600.000 tonsum av fiskavørum kring allan heimin. Eimskip arbeiðir við at stovna fleiri skrivstovur og fáa fleiri umboð í umráðum, sum eru av týdningi fyri fiskivinnuna, siga Eimskip í Føroyum í tíðindaskrivi.

# Hvalvíksprestur prædikar á ólavsøku

Tað verður Mogens Tilsted Christensen, sóknarprestur í Norðurstreymoyar prestagjaldi, sum prædikar á ólavsøku í ár.

Tað er altíð tann seinast setti presturin, sum ikki hevur hildið ólavsøkuprædikuna áður, ið heldur ólavsøkuprædikuna.